# Føroyskt fíggjareftirlit er dýr loysn

**Tíðindaskriv frá Føroya Sparikassa**

Kostnaðurin av einum føroyskum fíggjareftirliti kann gerast dýrur, heldur stjórnin í Føroya Sparikassa. Hon undrast á, at fíggjarstovnarnir ikki eru tiknir við upp á ráð, nú avgerð er tikin um at yvirtaka alt fíggjarøkið

– Avgerðin um at yvirtaka peningastovnsøkið er politisk, og vit leggja okkum ikki út í hana. Kortini undrar tað okkum, at avgerðin er tikin, uttan at peningastovnarnir eru eftirspurdir ella tiknir við upp á ráð, sigur stjórnin í Føroya Sparikassa, ið er samansett av Marner Jacobsen, forstjóra, og Bjarna Olsen, stjóra.

Føroysku peningastovnarnir halda, at teir eru hildnir uttan fyri avgerðina hjá landsstýrinum um at yvirtaka peninga- og kredittmál frá donskum myndugleikum komandi ár. Tað er greitt, hóast yvirtøkan snýr seg um sjálvt virkisøkið hjá peningastovnunum, og hóast peningastovnarnir sjálvir gjalda fyri t.d. at fáa fíggjareftirlit framt.

## Dýr loysn

Higartil eru eingi nágreinilig tøl sett á yvirtøkuna av peninga- og kredittmálum, men Sparikassin metir, at hetta kann gerast ein kostnaðarmikil yvirtøka bæði fyri samfelagið og peningastovnarnar.

Fíggjareftirlitið, ið er partur av yvirtøkuni, hevur t.d. ikki bert til uppgávu at halda eyguni eftir fíggjarstovnum. Stovnurin framleiðir eisini hagtøl, ger analysur av ymsum viðurskiftum og veitir peningastovnunum ráðgeving. Lógarviðgerð og lógarsmíð eru eisini økir, sum fíggjareftirlitið er partur av.

– Tí er fíggjareftirlitsuppgávan størri og tyngri, enn fleiri halda, og neyðugt verður uttan iva at keypa dýran serkunnleika uttan fyri landoddarnar, sigur sparikassastjórnin, sum í sama viðfangi vísir á, at fíggjarstovnarnir í landinum helst fara at fáa øktar útreiðslur orsakað av yvirtøkuni hjá landsstýrinum.

– Føroya Sparikassi rindar danska fíggjareftirlitinum uml. 100.000 krónur árliga. Okkara boð er, at føroyska fíggjareftirlitið verður munandi dýrari. Tess dýrari loysnir, vit velja, tess verri gerst kappingarførið hjá fíggjarstovnunum, sigur stjórnin í Føroya Sparikassa, ið fegin vil síggja tøl ella útrokningar, sum kunnu vísa, hvussu dýr yvirtøkan av fíggjarøkinum kann gerast fíggjarstovnunum og harvið kundunum í Føroyum.

## Trúvirði kostar

Útreiðslur fara helst eisini at standast av, at trúvirðið hjá einum føroyskum fíggjareftirliti uttanlands ikki verður eins stórt og ta trúvirði, danska fíggjareftirlitið hevur í útlondum.

– Peningastovnar í Føroyum verða helst noyddir at lata seg 'rata' hjá Moody's, Standard & Poor's ella líknandi kredittmetingarstovnum uttanlands, og tað kostar nógvan pening. Vit kunnu bert skeita til Íslands fyri at síggja, at rating er neyðug í smáum londum, hóast eitt virkið fíggjareftirlit er í landinum, sigur stjórnin í Sparikassanum.

Peningastovnsleiðslan spyr eisini, hvussu verður við donsku innskjótaratrygdini, ið er partur av peninga- og kredittmálum - og sum føroysku peningastovnarnir eisini hava verið við til at goldið til.

## Aðrir vansar

Stjórarnir í Sparikassanum vísa á, at vansarnir við einum føroyskum fíggjareftirliti eru fleiri.

Føroyska fíggjareftirlitið fær eitt nú trupult við at fáa ta venjing og rutinu, sum eftirlit í størri londum fáa. Harnæst kemur, at tess minni samfelagið er, tess meira samantengd verða eftirlit og tann, sum er undir eftirliti.

Hinvegin hevur eitt føroyskt fíggjareftirlit helst tann fyrimun, at tað hevur góðan kunnleika til føroysk viðurskifti.

– Saman um tikið verður tungt og kostnaðarmikið fyri samfelag og peningastovnar, at eitt føroyskt fíggjareftirlit skal setast á stovn og rekast - um nakar dugur skal vera í tí.

Stjórnin í Sparikassanum mælir til, at nágreiniligur kostnaður verður settur á yvirtøkuna - bæði fyri tað almenna og fyri peningastovnarnar, og harvið kundar teirra, og Sparikassin metir tað hava stóran týdning, at allir partar í málinum verða hoyrdir og tiknir við upp á ráð, áðrenn endaligar avgerðir verða tiknar um peninga- og kredittmálini.

# Bústaðarpolitikkur í samstarvi við norðurlond

**Tíðindaskriv frá Heilsumálaráðnum**

Í sambandi við ársfundin hjá Norðurlandaráðnum í Oslo hevur Bill Justinussen, landsstýrismaður, sum umsitur bústaðarmál, luttikið á fundi millum norðurlendsku bústaðarmálaráðharrarnar. Á fundinum varð avgjørt at økja tað bústaðarpolitiska samstarvið millum norðurlond øðrumegin og baltisku londini og Pólland hinumegin. Hetta samstarvið miðjar millum annað ímóti at bróta niður handilsforðingar innan byggivinnuna, og at økja um bústaðarpolitiska samstarvið til tess at skapa betri bústaðir fyri fólk, ið hava serligan tørv til bústaðin.

Landsstýrismaðurin hevur longu sett í verk arbeiðið at gera bústaðarpolitiskar broytingar í Føroyum, við at seta gongd á lógararbeiðið í sambandi við alternativa bústaðarbygging. Landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at bøta um samstarvið við Ísland og Noreg fyri at læra av teirra bústaðarpolitisku royndum, tí bústaðarmarknaðurin í hesum londum er mest átøkur tí føroyska.

Í hesum sambandi varð vitjað í norska Husbankanum, sum fíggjar umleið helvtina av tí norska bústaðarmarknaðinum. Hetta var ein sera lærurík vitjan.

Eisini varð høvið nýtt at tingast við íslendska heilsumálaráðharran og formansskapin í Útnorðurráðnum um at økja um samstarvið á sjúkrahúsøkinum. Á einum fundi millum grønlendsku, íslendsku og føroysku heilsumálaráðharrarnar fyrr í ár varð avgjørt at kanna møguleikarnar fyri hesum heilsupolitiska samstarvi. Nú er staðfest, at áhugi er fyri samstarvinum. Tí verður nú kannað, um íslendska heilsuverkið hevur nøkur tilboð, ið kunnu verða alternativ til ávísar viðgerðir, sum føroyskir sjúklingar í løtuni fáa í Danmark.


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

www.smyril-line.fo




til Noregs

Farið verður úr Føroyum 1. mars 2004 og vit verða aftur í Føroyum 11. mars 2004. Staðkendur føroyingur er ferðaleiðari. Møguleiki verður eisini fyri at gera útferðir í økinum.

Gist verður í 4 koyggjukamari við wc/bað og sjónvarpi umborð á Norrönu.

Úr Bergen verður farið við bussi til Voss, har gist verður í 7 nætur á HOTEL JARL, sum liggur miðskeiðis í Voss.

Prísur fyri hvønn 5.995,-

**Íroknað prísin er:** 1/2 pensjón á hotellinum, 7 daga skíðpass og bussferð Bergen-Voss, fram og aftur.

Eyka fyri einakamar: .......... 805,- kr.
Eyka fyri 2 koyggjukamar umborð á Norrönu: .......... 560,- kr.
Eyka fyri ferðatrygging: .......... 138,- kr.



Á hotellinum er m.a. biljard, vínstova, pubb, diskotek, svimjihylur og borðtennis. Kømurini hava m.a. minibarr, sjónvarp og telefon. Meir fæst at vita á ***www.jarlvoss.no***

SMYRIL LINE



SINNISBATI
takkar

Sinnisbati takkar tykkum mongu , sum stuðlaðu tiltøkunum, ið felagið skipaði fyri í sambandi við altjóða sálarheilsudagin 10. oktober 2003.

Vit fegnast um góða undirtøku frá avvarandi limum í Sinnisbata og limum í øðrum feløgum.

Heilsan
Nevndin í Sinnisbata





# Starvsfólk
## til Burger King í SMS



### Aftaná skúlatíð

Søkt verður eftir fólki M/K at arbeiða nakrar tímar um vikuna - eftir skúlatíð og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber. **Eitt sera vælegna starv um tú ert lesandi.**

Ert tú opin, virkin og røkin, so ert tú kanska ein av teimum, vit leita eftir. Vit vænta, at tú eins og vit eru tilreiðar at veita kundum okkara eina skjóta og góða tænastu. Vit læra teg á staðnum...

### Fulla tíð

Søkt verður eftir fólki M/K til fulltíðarstarv - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber.

Ert tú opin, virkin og røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit læra teg á staðnum og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

**Send umsóknina og møgulig viðmæli til: Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.**
**Tað ber eisini til at søkja beinleiðis á internetinum - hygg á www.sms.fo**

Burger King • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 30 41

® Burger King and Whopper are registered trademarks of the Burger King Corporation